Lívdin
- í lívd hins hægsta

Januar 2007

Tíðindi | Kunning | Lýsingar | Skráir

# Samkomufundur



Týskvøldið tann 28. november var samkomufundur í Lívdini á Brekku. Fult hús var, og fólk vóru spent og í góðum lag. Høvuðsevnið hetta kvøldið var nýggi samkomubygningurin hjá Lívdini! Tíðin nærkast í hvørjum, tá byggingin skal byrja, og fólk vóru spent upp á at síggja nýggju tekningarnar, sum Selmar og byggibólkurin hava gjørt.

Selmar Nielsen byrjaði við at vísa bygningin og leiddi samkomuna gjøgnum bygningin við eini 3D framløgu av nýggju Lívdini. Jóhan Syderbø vísti á, hvussu tíðarætlanin viðvíkjandi sjálvari byggingini kundi verið. Johnny í Grótinum legði fram peningaviðurskiftini og legði dent á týdningin av, at hvør einstakur í Lívdini halgar seg til at geva til karmarnar fyri sítt andaliga heim.

Fólk fingu høvi at seta spurningar, og nógvir góðir spurningar og viðmerkingar komu fram.

Jógvan Zachariassen endaði løtuna við at vísa á høvuðsendamálini við bygninginum. Høvuðsboðskapurin var úr Filippibrævinum 4:19: *„Og Gud mín skal eftir ríkidømi Sínum fylla allar tørvir tykkara dýrabart í Kristi Jesusi.“* Hetta er eitt undurfult lyfti frá Gudi, men Jógvan vísti á, at við hvørjum lyfti koma eisini ábyrgdir. Ábyrgdin hjá Lívdini er at eyðkennast av einleika, gávumildni, góðum vitnisburði og nøgdsemi.

Kvøldið endaði við bøn og eini góðari samfelagsløtu, har fólk dúgliga tosaðu um høvuðsevnið fyri kvøldið: Nýggi samkomubygningurin hjá Lívdini.

Nýggju tekningarnar eru at síggja á heimasíðuni hjá Lívdini – www.livdin.fo

Lívdin_jan.indd 1 05-01-2007 10.41.24

## Keyp hina lagaligu tíð

Øll okkara hugsa regluliga um okkara vantandi tíð. Flestu okkara høvdu ynskt at havt meiri tíð, soleiðis at vit kundu gjørt alt tað, vit so fegin vildu gjørt. Kortini vita vit øll, at tíð er nakað, sum eingin fær meira ella minni av. Har eru vit øll líka. Vit hava øll fingið 24 tímar hvønn dag. Flestu okkara hugsa tó ikki um, at vit hava fingið okkara tíð at ávirka og umbroyta menniskju, sum eru fortapt. Gud kallar á okkum um at *„keypa hina lagaligu tíð – tí dagarnir eru óndir!“* (Ef. 5:16). Tann lagaliga tíðin, sum Paulus tosar um her, er ikki tíðarfest tíð. Um Paulus hevði hugsað um tíðarfesta tíð, hevði hann brúkt orðið *chronos*. Men Paulus brúkar orðið *kairos,* sum tosar um ásetta tíð – rætta tíð ella lagaliga tíð (Róm. 5:6).



Vit mugu brúka tíðina at fáa sum mest burtur úr teimum møguleikum, sum Gud hevur givið okkum ásettu tíð okkara! Møguleikarnir eru allastaðni rundan um okkum, og teir eru bert okkara – bert mínir og tínir. Tíðin er stutt, og hon er ónd. Tað góða er tað, at hvør okkara kann við Heilaga Andans styrki í tí stuttu tíð, vit hava, spreiða ljós í einum myrkum heimi. Mín bøn er, at vit í Lívdini hugsa meiri um okkara lagaligu tíð enn okkara vantandi tíð í 2007.

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Tillukku við hjúnabandinum





**Sólvá og Walther gift**
22. september 2006 giftust Sólvá Jacobsen úr Havn og Walther Skræp úr Vodskov á Dronninglund Slot í Norðurjútlandi. Tey vórðu gift av Annette Grarup, presti í baptistkirkjuni í Gandrup-Vodskov. Fleiri av teirra vinfólkum og familju úr Føroyum vóru til hátíðarhaldið. Sólvá og Walther búgva í Hoyvík. Børnini eru: Maria, 10 ár, David, 3 ár.

**Sámal og Barbara gift**
Fríggjakvøldið 3. november 2006 giftust Barbara Steinkross, Tvøroyri, og Sámal Joensen, Tórshavn. Tey vórðu gift av Jógvani Zachariassen á Gjáargarði.

Sámal og Barbara búgva í eini íbúð við Landavegin í Havn, til nýggju húsini í Streymnesi verða liðug einaferð í vár.

## Tillukku við silvurbrúdleypinum

**Lív og Hans Clementsen**
Týsdagin 28. november 2006 kundu hjúnini Lív og Hans Clementsen í Hoyvík halda silvurbrúdleyp. Dagurin varð hildin leygardagin 25. november í samkomuhúsinum Oasuni í Hoyvík.



# Tiltøk

## TILTØK Á BREKKU 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



*Á Brekku 3*

| | |
|---|---|
| Undirvísing og bøn | týskvøld kl. 20.00 |
| *(Triðja hvørt týskvøld eru húsbólkar)* | |
| Bønarløta fyri ung | mikukvøld kl. 18.00 |
| Ungdómsmøti | fríggjakvøld kl. 20.30 |

## Lívsdroparnir

er tiltak fyri børn frá 1. til 10. flokk á Brekku 3 í Hoyvík

**Mánadag:**

| | |
|---|---|
| Børn og ung frá 1. til 5. flokk: | kl. 16.45-19.00 |
| Børn og ung frá 6. til 10. flokk: | kl. 17.45-20.00 |

Øll eru hjartaliga vælkomin! Bjóðið endiliga øðrum við.

**Lívsdroparnir**

- søga
- bólkaarbeiði
- nýggir vinir
- hava tað stuttligt
- syngja
- leikur
- gera ymiskt handaligt arbeiði

## SMS-skipanin hjá teimum ungu

Um tú vilt vera við í SMS-skipanini hjá teimum ungu í Lívdini, skriva so:
„Liv ung tilmeld"  (síðan títt fornavn og eftirnavn)
Send til: 591901

## Dreingjabólkur

Dreingjabólkur fyri dreingir, sum ganga í 1. 2. og 3. flokki, er hvørt seinasta fríggjakvøld í hvørjum mánað. Tann, sum vil vera við, kann seta seg í samband við Ninu Dalsgaard, tlf. 267733 ella á teldupost nina-d@post.olivant.fo

## Fólk til sunnudagsskúlan

Sunnudagsskúlin sóknast eftir fólki til at undirvísa børnum.

Hevur tú hug at vera við í hesi týdningarmiklu tænastu, hvørs endamál er at vinna børn fyri Harran, kanst tú venda tær til Beintu Áargarð, tlf. 312655, aargard@kallnet.fo

## Praktiskar tænastur

Nøkur fólk hava í seinastuni teknað seg til ymisku praktisku liðini, og tað er gott. Men vit høvdu ynskt, at enn fleiri teknaðu seg til liðini, og tí heita vit á fólk um at seta seg í samband við ein av hesum:

- hølini á Brekku – Lív Clementsen (tlf. 516714)
- uppseting – Árant Jacobsen (tlf. 312054)
- køkur – Sunnvá Jacobsen (tlf. 315447)

*„Hann er eingin dári, sum letur tað fara, sum hann ikki kann varðveita, fyri at vinna tað, sum hann ikki kann missa."*

*Jim Elliot, Auca-trúboðari*

*Ungdómsmøtir*

## Ungdómur við hugsjónum




*Tað eru Knút Dalsgaard, Bergur Thorsteinsson og Ari av Rana, sum skipa fyri hesum ungdómsmøtum*

Fyriskipararnir av ungdómsmøtunum í Lívdini, Knút Dalsgaard, Bergur Thorsteinsson og Ari av Rana, siga soleiðis um ungdómsmøtini: „Vit vilja fyrst og fremst at hava Føroya feitastu ungdómsmøtir, sum eru fyri ØLL. Ikki bert hava eitt 'show' koyrandi og so liðugt, men at vit loyva Andanum framat og at virka. Vit vilja, at tey ungu kenna, at tey hava eitt andaligt heim, har tey ALTÍÐ kunna kenna seg vælkomin.

Vit vilja fyrst og fremst at røkka Hoyvík og Havnina og síðani allar Føroyar. Síðan er tað bert Gud, ið setir markið fyri restini. Vit vilja, at tað ikki 'bert' er eitt ungdómsmøti hvørt fríggjakvøld kl. 20.30, men at vit hava andaligt virksemi so at siga hvønn dag, t.v.s. bønarløtur, hugnaløtur, bíbliuundirvísing og samfelagsløtur. Vónandi kemur alt hetta í gongd skjótast gjørligt, men tað er eitt stórt arbeiði, ið krevur nógvar fyrireikingar. Vit sóknast tí eftir fólki til at hjálpa til við praktiskum arbeiði og fólki við góðum hugflogi.“

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla







### Sunnudagin 7. januar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Inngangur.*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Virði teirra heilagu.*<br>*Talari: Kristian Hansen.* |

### Sunnudagin 14. januar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Sjónvarpsmøti.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið.*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen.* |

### Sunnudagin 21. januar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Kærleiki.*<br>*Talari: Anja Hansen.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið.*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen.* |

### Sunnudagin 28. januar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Gleði.*<br>*Talari: Símun Absalonsen.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Lovsongsmøti.* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*

Lívdin_jan.indd 4 05-01-2007 10.41.30